um heimalívið, men hann hevur víðkað hesar frásøgumerktu myndirnar við øðrum meira dekorativum myndevnum. Hetta er galdandi fyri teir mongu grínandi skøltarnar, sum listamaðurin hevur valt at málað einamest av tí einfaldu orsøk, at honum dámar vakra formin á menniskjaligа skallanum. Myndirnar eru allar pastost málaðar við nógvum, tjúkkum løgum av máling, meðan myndevnið oftast er ógvuliga einfalt. Í summum myndum sameinir listamaðurin tað dekorativa og tað narrativa, eitt nú í myndini "Gul bygd", har Hanni Bjartalíð um somu tíð vísir til og endurnýggjar klassiska føroyska bygdamyndevnið.



Hanni Bjartalíð moderniserar klassisk myndevni



Hanni Bjartalíð. Myndir við jarðsambandi



Poetisku húsini hjá Hanna Bjartalíð

## Føroysk list kolldømd

Tey eru ikki tespilig, ummælini, sum føroysk listafólk hava fingið niðri í Danmark í seinastuni. Fyrst var tað skarprættarin á Information, tann trendy listasamlarin Michael Jeppesen, sum so at siga legði linjuna, tá hann við støði í framsýningini "Natúrligvís" kolldømdi alla føroyska list (uttan Zacharias Heinesen!), tá hann staðfesti, at grundir eru til, at føroysk list ikki er kend uttan fyri Føroyar.

Og herfyri var tað freelance-ummælarin, akademikarin Torben Sangild, sum í mong ár hevur ummælt tónleik, sum í Politiken gav okkum av grovfíluni í ummæli av framsýningini "Færøsk samtidskunst" á Bryggjuni við at sammeta føroysk listaverk við verk, ið eru at finna á einum og hvørjum kvøldskúlaskeiði. Eitt ummæli er bert ein meining. Hendan meiningin fær kanska eina breiðari eksponering enn aðrar meiningar, men framvegis er hon bert ein meining, sum lesararnir kunnu taka støðu til. Men mong hava øst seg um ummælið hjá Sangild, sum er ørkymlandi, tá hugsað verður um, at nøkur av okkara bestu listafólkum luttóku á teirri ummældu framsýningini.

Í staðin fyri at harmast skulu vit kanska gleðast um atfinningarnar. Eg vil til ein og hvørja tíð heldur hava erligar ákoyringar enn tey deymutu føroyavinaligu ummælini, sum altíð vóru prinsipielt positiv á teirra serliga, eitt sindur niðurlátandi hátt við støði í romantiseraðu og stereotypu ímyndini av føroyingum sum eitt primitivt náttúrufólk. Føroyingar eru komnir víðari, og tað eru okkara listafólk sanniliga eisini, tó at vit møguliga ikki duga so væl at gera vart við hetta.

Eitt nú er listamaðurin Marius Olsen (sum var ein teirra, ið funnist varð at í ummæli Sangilds) í sínum verkum bæði metalistarligur og filosofiskur, sum eg veit ikki hvat. Hansara myndir eru intertekstuellar ella sipa til aðrar myndir, eins og tær ofta innihalda myndir í myndini osfr. Hetta er bara ikki nakað, sum Marius ger serliga nógv burtur úr í heitum sínum, sum ofta eru rættiliga ítøkilig og beint fram.

## Vantandi kunnleiki til føroyska myndlist

Uppgerðin við "Færøkunst" er óivað tiltrongd, men tað, vit nú hava sæð av donskum ummælum, er tíanverri merkt av vantandi kunnleika til føroyska list, sum helst er úrslitið av vantandi áhuga, ið aftur kann hanga saman við mongdini av vánaligari føroyskari list, sum hevur verið eksporterað til Danmarkar millum ár og dag. Alt hetta úrslitar í, at tað gerst í lagi at spilla føroyska list út í ummælum, har tað verður siktað sum í blindum. Tú skalt í øllum førum vera starblindur fyri ikki at fata poetiska lættleikan og listarligu tyngdina í verki Anker Mortensens (eisini ein teirra, ið funnist var at í nevnda ummæli).

Sum rákið hevur verið seinastu árini, er abstrakt myndlist rættiliga ómoderna, (eitur tú ikki Per Kirkeby og framsýnir á Tate Modern í næstum), og sum tað sær út í løtuni, er føroysk list eisini ómoderna í øllum førum millum ummælarar í Keypmannahavn. Hesum kunnu vit tó liva við, so leingi vit hava framúr listafólk sum tey, ið sýna fram á framsýningini "Býarløg" og tey omanfyri nevndu, eins og Trónd Patursson, Tórodd Poulsen, Arnold Vegghamar, Rannvá Kunoy, Zacharias Heinesen og Torbjørn Olsen fyri bert at nevna nøkur – har eru mong onnur.

Tað, okkum vantar, er tað, sum eigur at vera rundan um listina, t.d. kompetenta listaformidling og listakjak, ið kann hækka støðið ikki á listini, men á føroyska listatilvitinum. Hetta hevði óivað heilt av sær sjálvum ført við sær fjølbroyttari listatilgongdir, herímillum eisini meira av konseptlist. Tað, sum krevst, umframt útbúgvingarmøguleikar her á landi, er heilt einfalt, at fólk við rættum førleikum verða sett í rættan sess allastaðni, har listin verður viðgjørd, stuðlað og formidlað.



Myndirnar hjá Anker Mortensen eru næstan sum ein listarligur biðimúrur at sjá



Tvær myndir hjá Anker Mortensen



Ein nærmynd av fabulerandi myndunum hjá Anker Mortensen

**Framsýningin »Býarløg« í Müllers Pakkhúsi í Havn er opin fram til 18. juni 2009 dagliga frá klokkan 14:00 til 17:00. Tað er Inger Smærup Sørensen, listfrøðingur, sum hevur kuraterað framsýningina**